Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Bíleggingarskipanin til koronukoppseting

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at skipa aðrar møguleikar at bíleggja tíð til koppseting enn gjøgnum verandi bíleggingarskipan ?

2. Hvørjar avtalur eru gjørdar við eigaran av bíleggingarskipanini um atgongd til upplýsingar í skipanini og um handfaring, burturbeining v.m. ?

Viðmerkingar:
Tað er at fegnast um, at tað gongur framá við koppsetingini, og at eldri fólk nú kunnu bíleggja tíð at verða koppsett.

Bíleggingarskipanin krevur tó, at fólk, sum ikki duga ella ikki brúka tøknina, mugu hava avvarðandi ella onnur at hjálpa sær og m.a. lata upplýsingar um p-talið til onnur. Hetta kann ikki sigast at vera virðiligt. Tí tað, at tú er 75 ár, merkir ikki, at tú hevur mist allar førleikar, ella at tú er ómynduggjørd. Harumframt er ikki vist, at fólk ynskja at draga onnur inn í síni persónligu viðurskifti.

Komið er fram, at bíleggingarskipanin er ment av og ogn hjá privatari fyritøku, og tí er viðkomandi at fáa upplýst, hvør hevur atgongd til upplýsingarnar í skipanini. Tí verður eisini spurt um hesi viðurskiftini.

Á Løgtingi, 8. apríl 2021

Beinta Løwe Jacobsen